Sosialurin
Nr. 241 - 13. desember 2006



*Mazda BT-50 slapp at prógva hvat hann klárar undir "ekstremum" koyriumstøðum*

ATTART OFF ROAD PARK

Mazda BT-50:

# Attart Off Road Park

**Nærhendis Athen fingu vit høvi at royndarkoyra Mazda BT-50 undir ekstremum koyriumstøðum í "Attart Off Road Park". Á eini slíkari breyt ber veruliga til at royndarkoyra bilar, ið bjóða seg fram sum "off roadarar"**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Magnus Gunnarsson*

**Athen:** Nakað uttan fyri Athen er "Attart Off Road Park", sum er eitt stórt øki, ið sum navnið sigur, er gjørt til at royndarkoyra "off roadarar".

Í mun til tá ein persónbilur verður presenteraður í útlandinum, er tað nokk so nógv annarleiðis, tá talan er um ein 4x4 pickup. Her er talan um bilar sum skulu orka væl at draga og klára seg væl bæði á vanliga koyrivegnum og uttan fyri vanliga koyrivegin, eisini har tað sær út til at vera óframkomiligt.

Bert at koyra á vanligum koyrivegi sigur ikki so nógv um ein slíkan 4x4. Tí vóru bilarnir royndarkoyrdir á "Attart Off Road Park", ið er ein runubreyt við ringast hugsandi koyriumstøðum.

Tað var "imponerandi" at síggja, hvussu væl BT-50 kláraði seg í tí óframkomilga lendinum í Attart Off Road Park. Upp á heyggjar og niður í runudýki, har vatnstøðan var um hálvan metur fleiri staðni. Á eini slíkari breyt ber veruliga til at royndarkoyra ein bil sum kallar seg "off roadara".

Motorjournalistarnir sluppu at royna bilarnar og seta teir "upp á prøva" undir "ekstremum" koyriumstøðum á hesi breytini, sum er gjørd til royndarkoyring av slíkum bilum. BT-50 koyrdi sum eitt "tanks" og kom fram allastaðni. Hóast vit royndu at provokera bilin við t.d. at steðga í brattlendi, ella har sum vatnstøðan var um hálvan metur høg. Har var eingin trupulleiki, hann slapp altíð avstað aftur. Eingir trupulleikar við at klára seg gjøgnum hesar óframkomiligu koyriumstøður.

**Royndarkoyringin á "Attart Off Road Park" er eisini at síggja sum kykmyndir á portalinum.**



*"Attart Off Road Park" er eitt stórt øki, ið er gjørt til at off road. Eitt slíkt øki kundu vit væl havt í Føroyum til ymsikar off road koyring og kappingar*











**BT-50 koyrdi sum eitt "tanks" og kom fram allastaðni**